# Havstovan søkir eftir **bókhaldara**



## Starv sum bókhaldari á Havstovuni er leyst at søkja

**Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til:**


**Maritu Rasmussen**
*Stjóra*
marita@hav.fo
tel. 793900

ella

**Erling í Liða**
*Fíggjar-og umsitingarleiðara*
erlingl@hav.fo
tel. 793901


Havstovan sóknast eftir dugnaligum og ágrýtnum bókhaldara at byrja frá **1. januar 2023** ella skjótast gjørligt. Talan er um eitt hálvtíðarstarv. (lønarbrøk 0,5)

Havstovan er ein stovnur undir Fiskimálaráðnum og varðar av havrannsóknarskipinum Jákup Sverra, Hvalagransking og Fuglakanningarstøðini.

Starvið er fjølbroytt og áhugavert og fevnir um bókhald, skrivstovuhald og móttøku og annað fyrifallandi arbeiði.

### Førleikakrøv:

- Skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving
- Royndir við fyrisiting
- Kunnleika um kt-skipanir, so sum Búskaparskipan Landsins, ol.
- Góðan málførleika
- Góðan telduførleika á brúkarastigi
- Góð samstarvsevni og góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt

### Vit bjóða

Eitt fjølbroytt starv við nógvum skiftandi uppgávum og samskifti bæði innanhýsis og úteftir.

### Lønar- og setanarviðurskifti

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið.

### Umsókn

Umsókn saman við avriti av prógvum, CV og møguligum ummælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin **16. desember 2022**. Umsóknin skal sendast við telduposti til ***starv@hav.fo***


HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo